# Eivør hugtekur allan heimin



**Alt bendir á, at Eivør Pálsdóttir er á veg á altjóða stjørnuhimmalin. Tað tykist bert vera ein spurningur um tíð, til fløgan »Krákan« kemur út á einum alheims plátufelag og spátt verður, at innan langa tíð telist Eivør millum kendastu kvinnuligu rockstjørnurnar. Føroyska umboðskvinnan hjá Eivør hevur bert bíðað, til altjóða pallurin fekk eyguni upp fyri Eivør**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Festivalurin Midem 2004 er við at enda í Cannes í Fraklandi. Har hittast fólk úr tónleikavinnuni og Tutl hevur onkutíð verið við.

Í ár tóku 9 íslendsk plátufeløg lut, eisini 12 Tónar, ið hevur givið út fløguna »Krákan« við Eivør Pálsdóttir. Felagið tók lut mest fyri at føra fram fløguna hjá Eivør.

Og væl hevur gingist. Mong stór plátufeløg kring allan heim eru áhugaði í at gera sáttmála við 12 Tónar og Eivør og geva úr »Krákuna«. Næstu vikurnar fara umboð fyri 12 Tónar saman við løgfrøðingum at hyggja nærri at tilboðunum, men longu nú sigst, at fleiri teirra eru sera lokkandi.

Jens Guð, íslendskur tónleikaserkønur og Føroyavinur, heldur vera víst, at innan 2004 er av, verður »Krákan« at síggja altjóða marknaðinum - útgivið av einum altjóða plátufelag. Og hann metir somuleiðis, at innan tvey ár tosa altjóða tónleikafjølmiðlar um Eivør um somu tíð og á sama hátt, sum Bjørk. Tær tvær stóru stjørnurnar »from the cold seas«.

## Bíðaði bara

Sjálv er Eivør á Havaii, og veit helst lítið ella einki um góðu tíðindini. Sosialurin royndi at fáa fatur á Eivør fyri at bera henni góðu tíðindini, men samband var ikki við fartelefonina.

Men ístaðin fingu vit fatur á Sigvør Laksá, ið er umboðskvinna hjá Eivør.

- Eg havi ikki tosað við Lárus Jóhannesson frá 12 Tónar enn, so eg veit so lítið at siga. Og Eivør hevur helst sløkt telefonina, nú hon er á Havaii, og veit kanska einki um alt hetta, sigur Sigvør Laksá.

Tó sigur hon, at hon hevur bara bíðað, til onkur á altjóða pallinum fekk eyguni upp fyri Eivør.

- Hetta kemur ikki so óvart á meg, men tað kemur kanska meira óvart á Eivør sjálva, metir Sigvør, sum tó var í samband við Lárus Jóhannesson frá 12 Tónar fyrr í vikuni, men tá visti hann ikki so nógv at siga frá.

Eivør verður aftur tann 6. februar og hon hevur nokk at taka sær til. Tá er undirvísing á skránni í Norðurlandahúsinum. Eivør ger eisini tónleik til ein íslendskan sjónleik, umframt at annað eisini er á skránni. Ætlandi skal hon vera við til allar framførslurnar av leikhum, men um tað letur seg gera er ein annar spurningur, sigur Sigvør Laksá.

Fyrispurningar eru eisini komnir frá festivalum, t.d. úr Nibe. Og úr Finnalndi og londum har á leið er áhugi eisini vístur, so nokk er at síggja til hjá Eivør, sum helst ikki sleppur at liggja á løtu síðuni, tá hon kemur heim aftur av sóloyggjunum handan hav. Her er ikki sól og hiti enn, men ístaðin tykist eydnusólin smíla til Eivør og fer tað helst eisini at merkjast, tá hon vendur heimaftur.

J. Bronck gøta 37 · Postboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

Bilpakka TILBOÐ Summarið 2004

Bilur + 2 fólk til Danmarkar úr 2.720,-
**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Noregs úr 1.960,-
**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Hetlands úr 1.420,-
**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Íslands úr 2.330,-
**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE



# Fram í ljósið



*– Hetta kann kanska kallast ein pallur fyri tey, sum ikki eru so kend innan listarheimin í Føroyum, men sum væl kundu hugsað sær at sýnt fram, sigur Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Norðoya Sparikassa*

**Norðoya Sparikassi er nú farin í holt við at skipa fyri einari listaframsýning, sum skal lata upp á Grækarismessu**

LISTAFRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Fram í ljósið er heitið á spennandi listaframsýning, sum Norðoya Sparikassi skipar fyri. Hetta er ein listaframsýning ætlað teimum ókendu og minni kendu listarfólkunum.

– Hetta kann kanska kallast ein pallur fyri tey, sum ikki eru so kend innan listarheimin í Føroyum, men væl kundu hugsað sær at havt framsýning, greiðir Gunnar Nolsøe, marknaðarleiðari í Sparikassanum frá.

Norðoya Sparikassi stuðlar tónleika lívinum og ítróttinum við eitt nú Tónleikagrunni stovnsins og sponsoravtalum, og heldur Gunnar, at hetta kann vera teirra ískoyti til tann listarliga partin.

Hann dugir væl at ímynda sær, at hetta kundi verið nakað, sum til dømis Norðoya Listafelag ella onnur tóku yvir við stuðli frá Sparikassanum, um undirtøkan verður góð.

– Hetta er í øllum førum eitt ískoyti frá Sparikassanum fyri at víðka um møguleikarnir hjá teimum minnu kendu listarfólkunum, sigur Gunnar Nolsøe.

## Fáir møguleikar

Tað var ein starvsfelagi hjá Gunnari, sum upprunaliga kom við hugskotinum. Hesin hevði tosað við ein persón, sum dámar væl at mála í frítíðini. Tá hesin frítíðarmálari varð spurdur, hví hann ikki luttók á listaframsýningum, hevði hann svarað, at tað eru so fáar, og tí so torført at koma fram sum listarfólk í Føroyum. Hetta fekk áðurnevnda starvsfelaga hjá Gunnari at koma til hansara og spyrja, um tað ikki var eitt hugskot, sum arbeiðast kundi meira uppá.

Gunnar var beinanvegin við upp á hugskotið, og saman arbeiddu teir seg fram til tað, sum í dag verður kallað Fram í ljósið. Ein listaframsýningin einans fyri teimum ókendu og minni kendu listarfólkunum.

– Vit løgdu hugskotið fram fyri onkran av okkara meira kendu listarfólkum, og hesi hildu tað vera eitt frálíkt hugskot, sigur Gunnar Nolsøe.

Listaframsýningin letur ætlandi upp á Grækarismessu tann 12. mars, og verður hon í Skálanum í Klaksvík. Evsta mark fyri at tekna seg til luttøku er tann 13. februar. Til ber at tekna seg við at venda sær til Norðoya Sparikassa.

SKATTALÆTTA
kunnu vit ikki lova tær
Men...
Tú kanst keypa fyri 400,- kr.
Og... vit bjóða tær
ÓKEYPIS vørur fyri 150,- kr.
Einans galdandi leygardagin 31. januar frá kl. 09.00 - 13.00
VALDEMAR LÜTZEN · Skálatrøð
har sólin og sjógvurin møtast

ÚTSØLA Í TELEBÚÐUNUM Byrjar mánadagin 2. februar
N·GAGE NOKIA
2 eyka spøl ókeypis
Fyrr 3700,-
Nú 2600,-
SIEMENS Gigasett A200
Sera brúkaravinarlig tráðleys telefon við digitalari ljóðgóðsku
Plug & play, standby tíð 200 t.
Fyrr 799,-
Nú 649,-
SIEMENS M55
Fyrr 1899,-
Nú 1499,-
NOKIA 6100
Fyrr 2995,-
Nú 1799,-
Keyp eina av hesum fartelefonum og fá eitt Teletíðarhald við 100,- talutíð
Útvaldar Telefonir og fartelefonir
Upp í -40%
Alt tilhoyr til fartelefonir -20%
+298 303030 www.tele.fo
Tilboðini eru galdandi so leingi, vøra er á goymslu. Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.
TELEBÚÐIN
Tórshavn 317010 · Miðvágur 332000 · Klaksvík 404500 · Sandur 361000 · Tvøroyri 371000 · Saltangará 404400